## VALGREINAR

# Eg vil virka fyri...

**Rúna Sivertsen**
*Valevni Fólkafloksins í Norðoyggjum*



- tað skal loysa seg betur at arbeiða og meiri skal verða eftir av lønini
- tað skal vera minst líka hugaligt at tjena seinasta krónuna, sum ta fyrstu.
- skattur og avgjøld skulu lækka
- skatta- og almannalógir skulu vera so familjuvinarligar, sum gjørligt.
- hjún við bert einari inntøku skulu hava sama rætt, sum tey við tveimum inntøkum.
- barnafrádrátturin skal støðugt hækka
- foreldur skulu sjálvi kunna velja, um børn teirra skulu ansast á stovni ella heima.
- barnaansing skal fylgja barninum, soleiðis at mammur, ið ynskja at verða heima hjá børnunum, skulu fáa stuðulin útgoldnan

### Hjálp til barnafamiljurnar

# Hvat við at tikið MVG'ið av barnaklæðum?

**Jónfinn Olsen**
*valevni Miðfloksins í Suðurstreymoy*



Tað verður nógv tosa um at hjálpa barnafamiljum her á landi, men tað tykist sum um, at tað ið barnafamiljurnar eru stórnýtarar av verður dýrari og dýrari sum tíðin líður. Nú er mjólkin dýrkað.

Hvat verður tað næsta? Nei, ongin veit at siga frá hvat liggur fjalt aftanfyri næstu kalendaralúkuna.

Barnaklæðir og barnaskógvar alt ov dýrt.

Skalt tú út at keypa klæðir til smá børn, er prísurin næstan tann sami, sum tá tú keypur plaggið til vaksin fólk. Tað sama er galdandi við barna skóm, so at siga.

Latið okkum hjálpa barnafamiljunum á ein øðrvísi hátt.

Latið okkum hjálpa barnafamiljunm við at gera tað bíligari at keypa pløgg, skógvar, blæður og mjólkaúrdráttir til børn teirra. Hetta kann gerast við at gera undantak í MVG-lógini og gera hesar vørur MVG-fríar.

Peningurin, ið kemur minni inn, verður vunnin á øðrvísi hátt.

"Hesin peningur, sum landi so missur, kundi verði fingin til vega á annan hátt. Tað kundi veri seg við at lagt eitt eyka avgjald á vørur, ið ikki eru so umhvørvisvinarligar. So høvdu vit við hesum fingið fólk at keypt meira umhvørvisvinarlig produktir og harvið fingið eina hugburðsbroyting í fólkið". Aðrir møguleikar eru sjálvsagt eisini tilstaðar, sum eg havi víst á í øðrum blaðgreinum sum eg havi skriva.

Góðu Føroyingar stuðlið okkum, í at gera eina roynd at stuðla tykkum. Gott val, vel Miðflokkin, X við lista H. Ella undirritaða.

# Uppgerð við ALS

**Jan Højgaard**
*valevni Miðfloksins í Eysturoy*

Vit í Miðflokinum halda, at ein uppgerð við ALS eigur at verða gjørd. Tað vil siga, at um ALS ikki vil gjalda arbeiðsleysum fiskimonnum, ið eru arbeiðsleysir eitt tíðarskeið, eiga fiskimenn saman við eitt nú vinnurekandi, tað verið kioskeigarar ella útrórðamenn og tey, ið eru fyri vanbýti í ALS at fáa egna arbeiðsloysistrygging. Eisini eigur ALS at gjalda teimum bólkum, ið hava verið fyri vanbýti pengarnar aftur, tí hesir bólkar eru tvungnir uppí ALS, uttan at teir hava fingið nøktandi rætt til útgjald. Hetta ið fram er farið, verður í Samfelagslæruni rópt Meirilutadiktatur og er reguler kúgan av einum samfelagsbólki. Eisini vilja vit skipa so fyri, at vinnurekandi og útróðrarmenn fáa sjúkrapengar, uttan at skula selja vinnutólið, ið skal vera teirra livibreyð, aftan á at tey eru komin fyri seg. Vit vilja hjálpa teimum veiku í samfelagnum. Pensjón til pensjónistar óskattað, skattalætta til arbeiðisfólk, geva teimum betri møguleika at verða hoyrd, og geva teimum lágt løntu/lesandi mammunum somu rættindi, sum tær høgt løntu mammunar hava. Allir borgarar líka fyri lógini.

# Hvør vil vera forsømdur?

**Heðin Mortensen**
*valevni Sambandsfloksins í Suðurstreymoy*



Enn eina ferð er eldraøkið eitt av stóru evnunum í valstríðnum, og tað er heldur ikki so løgið. Her er snøgt sagt einki hent!

Undir teimum báðum síðstu landsstýrissamgongunum hevur so dyggiliga verið arbeitt skeiva vegin, at hetta nú av álvara er farið at merkjast. Ikki so mikið sum eitt einasta ellis- og røktarheim hevur samgongan fingið bygt.

Taka vit bara tann partin av ríkisveitingini, ið samgongan tveitti frá sær, so kann eg upplýsa, at fyri hesar pengarnar kundu vit fingið røktarpláss til 400 av okkara gomlu. Men har er einki hent!

Hesi farnu árini hava verið eitt stórt vónbrot, tí hóast samgongan í tveimum umførum hevur sett sær fyri at arbeiða fyri størri sjálvbjargni og einum styrktum búskapi, hevur meinigi føroyingurin ikki kent nakran ágóða av hesum.

Tvørturímóti eru tey forsømd, ið meiri enn nakar hava brúk fyri flógvum og hjálpandi hondum. Tað er ikki bara á ellis- og røktarøkinum, at tað hevur haltað hjá landsstýrinum, tí innan fyri heilsu- og almannaverkið sum heild hevur gingið skeiva vegin.

Tí er stundin komin, at vaktarskifti verður í Tinganesi, so samfelagið aftur kann fáast á rætta kós og hugsast kann um tey virði, ið veruliga hava týdning. Vit kunnu bara spyrja okkum sjálvi: Hvør vil vera forsømdur?

Sambandsflokkurin raðfestir eldraøkið og heilsuøkið í fremstu røð, tí megna vit ikki at skapa teimum vælferð, ið undan hava gingið, eiga vit hana ikki uppiborna sjálvi!

# Hvat er Suðuroyggin uttan suðringar? (hvat eru Føroyar uttan føroyingar?)

**Bergur Bærendsen**
*valevni fyri Fólkafloksins í Suðuroy*

Nóg so torskild yvirskrivt heldur tú kanska, men bíða nú eitt sindur.

Søgan sigur okkum, at Suðringar gjarna hava verið í fremstu røð, tá talan hevur verið um at verja føroysk áhugamál, og ikki minni tá talan hevur verið um mál Suðuroynni at frama. Teir sum tá stóðu í fremsu røð, vístu fegnir, hvat og hvønn teir vardu. Teir vístu hetta í verki.

Flyta vit okkum frá hesum forna veruleika, fram til dagin í dag, sæst ein øðrvísi mynd. Í dag eru fólksins útvaldu tingmenn – teir sum skulu verja borg og laða niður garðar, umboðandi Suðuroynna, at síggja her suðuri, nakað sum lundi jólanátt.

Hvat er Suðuroyggin uttan suðringar? Gestablídni trýtur sum verða man ikki her; norðingar, føroyingar og annað gottfólk, eru sjálvandi meiri enn vælkomin at verða og virka her, saman við okkum.

Høvdu bara okkara egnu, okkara fólkavaldu, vilja støðast her hjá okkum. Einki er at undrast á, at teir ikki arbeiða saman, Suðuroynni at gagni. Teir finna helst ikki hvønn annan. Hvar er nú teirra bústaður. Her ella har? Hvør veit?

Fyri at snara hesum meiri á framtíðardám, má eg so spyrja! Kann hetta halda áfram?; skal hetta verða so? Og svari er sum verða man, NEI!. Øll vita vit, at øðrvísi og betri kundi støðan verið.

Suðuroyggin hevur nú, meiri enn áður, tørv á fólki, sum hevur sítt dagliga virki í oynni, millum fólki, á staðnum, til taks! Hvat annað er rímiligt?

Góðu Suðringar, fari á val 20 január og brúki tykkara møguleika,. at vinna Suðuroynni verulig umboð.

# Reint umhvørvi, - nú og framyvir

**Elna Skylv Hansen**
*valevni Fólkafloksins í Suðurstreymoy*



Í Føroyum hava vit altíð tikið fyri givið, at her er reint. Men ikki alt sæst við berum eygum, tá talan er um dálking.

Vit hava fingið eina Umhvørvisverndarlóg í 1988. Broytingar eru komnar í seinni eins og kunngerðir. Hetta er fyrsta stigið á vegnum.

Vit eiga at dagføra hesa lóg, so at vit tryggja okkum og teimum, ið eftir okkum koma, at føroyska umhvørvið er og verður reint.

Bæði fyri okkum og tað, vit liva av, er umráðandi, at alt okkara umhvørvi er reint. Vit eiga tí at taka til eftirtektar tey tilmæli, sum vórðu borin fram í frágreiðingini um útlát í Føroyum frá 1990-2001, tí vit dálka luft okkara í alt ov stóran mun.

Eisini fyri ferðavinnuna er umráðandi, at okkara umhvørvi er reint, tí júst tað reina havið, reina luftin og reina náttúran fáa ferðamannin at venda eygu síni henda vegin og velja sær Føroyar sum ferðamál. Henda vinna, sum skapar arbeiði í nógvum liðum í okkara samfelagi s.s. matstovur og gisting, hevur møguleikar fyri vøkstri. Besta 'trekplástrið' eru tær reinu Føroyar, eisini tí eiga vit framhaldandi at tryggja okkum, at vit hava eitt reint og ódálkað umhvørvi.



## VALGREINAR

# Ongin skipan er betri enn tey sum umsita hana gera hana til

**Edmund Joensen**



**Klondyke ella svartasta Afrika**
Ein korruptiónsserfrøðingur úr Transparency International hevur fyri stuttum, út frá 18 fjølmiðladømum síðan1998, øll tikin beinleiðis frá føroysku fjølmiðlunum, gjørt eina meting av okkara kæra føðilandi Føroyum. Dómurin er greiður og ljóðar soleiðis. "Hesi fjølmiðladømini geva eina mynd av Klondyke ella svartasta Afrika. Ikki einum nýmótans demokrati".

**Ongantíð aftur**
Orðini „ongantíð aftur" vóru "sloganið" hjá føroyskum politikarum aftaná at Føroyar í 1992 vórðu farnar á húsagang.

Tað vóru ikki politikararnir, men táverandi politiska skipanin, sum fekk skyldina fyri húsagangin. Tað søgdu í hvussu so er politikararnir.

Vit máttu hava nýggja skipan sum forðaði fyri endurtøku av sorgarleikinum.

**Nýggja skipanin**
Tvey løgting samtyktu eina nýggja stýrisskipanarlóg. Tað fráfarandi áðrenn valið í 1994 og tað nývalda løgtingið eftir valið 1994. Gildiskoman var sett til 1995 og 1996.

Tað altavgerandi við nýggju skipanina var at innføra sanna og reinføra parlamentarismu. Annað og líka týdningarmikið var at ábyrgd og mynduleiki skuldi fylgjast. Greitt ábyrgdarbýti ímillum løgting og landstýri. Ongin ivi skuldi vera um hvør hevði ábyrgdina. Løgting og landsstýri skuldu nú halda hvønnanan í skák so skipanin altíð varð hildin.

Løgmaður fekk meira vald bæði saman við løgtinginum og sjálstøðugt. Landstýrismenn, sum fyrr vóru valdir av løgtinginum, vóru eftir nýggju skpanini settir í og loystir úr starvi av løgmanni. Tað var í grundini lættari at skifta landsstýrismenn út enn vanlig starvsfólk. Alt var gjørt eftir "kunstins reglum", sum tikið verður til, fyri at liva upp til tað besta sum uppnáast kundi sammett við tey londini, vit vanliga sammeta okkum við. Londini sum eru kend fyri sanna og reinføra parlamentarismu.

Flestu okkara sótu eftir við tí kenslu, at løgtingið og politisku flokkarnir høvdu gjørt eitt væla arbeiði, at okkara amboð og skipan vóru minst líka góð sum hjá grannalondunum. Harumframt høvdu vit strammað reglurnar eina ella tvær tenn eyka við vilja. Alt samalt við tí í hyggju, at nú skuldi skil koma á. Nú skuldu Føroyar ongantíð aftur koma í ta vanæruligu støðu yvir fyri restini av heiminum.

Lógarkarmurin er bert byrjanin. Líka týdningarmikið er, at teir politikarar, sum skuldu umsita lógirnar frá byrjanini, evnaðu at leggja eina siðvenju sum livdi upp til ætlanirnar við lógarreglunum.

**Øll byrjan er trupul**
Øll byrjan er trupul, men hóast tað, so eydnaðist tað landstýri og løgtingi frá 1994 at leggja eina siðvenju sum samsvaraði við skrivaða orðið. Fíggjarlógararbeiðið batnaði ár um ár. Eykafíggjarlógirnar vóru komnar niður á eitt sera hóskandi støði. Eykafíggjarlógin seinasta heila árið hjá samgonguni 1997 var minni enn 12 mij/kr. Landstýrið og løgtingið høvdu lagt eina siðvenju, sum samsvaraði við ætlanina við samtyktu stýrisskipanarlógini. Lóg og landaskil valdaðið aftur. Onkur landstýrismaður reyk av í svinginum eisini.

**Nú sær verri út**
Hóast eftirkomandi landsstýrir og løgting fingu eina samlaða virkandi skipan á einum silvurfati, sær út til at teir hava mist alt á gólvi. Politiskt verður parlamentarisman misbrúkt til m.a. at keypa sær tað vald, sum ikki fekst við valið.

Sum dømi kann nevnast, at núverandi løgmaður hevur í fyrru samgongu selt sjálvstýrisflokkinum tvey stór málsøkir fyri sjálvur at koma til valdið. Ì núverandi samgongu er sami flokkur adopteraður og taldi bert við í eini samgongu saman við flokkinum hjá løgmanni sjálvum.

À henda hátt er nú blokerað fyri fríðari parlamentarismu. Keyp og søla av flokkum fyri skattgjaldaran pening er nú ført inn í skipanina. Tað var ikki ætlanin, heldur ikki millum linjurnar í lógartekstinum.

Eykafíggjarlógirnar eru nú aftur dagligur kostur og eru tær samanlagt vaksnar ár undan árið. Td. vóru tær árið 2002 heilar 230 mió/kr. og 2003 uppaftur størri heilar 250 mió /kr.

Landstýrismannaábyrgd er longri burtur enn ein býður í Kina. Vit hava verið vitni til at landstýrismaður var sitandi sjálvt um hann var skuldsettur fyri brotsverk av ringasta slag, og sum aðrastaðir hevði ført til fráseting beinanveg.

Vit hava verið vitni til mong handasløg av skuldsetingum mótvegis landsstýrismonnum, uttan avleiðingar, eisini ímóti sjálvum løgmanni. Hetta hendi Òlavsøkudag á 150 ára degnum fyri endurstovnanini av løgtinginum. Enn hevur ongin rætt hond frá síðu fyri at hondhevað tað, sum ætlanin var við nýggju skipanini.

**Úrslitið er ófrættakent**
Ein fær varhugan av at føroyingurin hevur givið upp, og at fólkið hevur vant seg við at liva undir heilt øðrum politiskum viðurskiftum enn teimum sum galdandi eru i okkara grannalondum.

Meðan vanligi føroyingurin eftir øllum at døma gerst alt meira "apatiskur" eru útlendingar byrjaðir at varnast óskilið.

Ein altjóða stovnur setti fyri stuttum fram harðar skuldsetingar móti Føroyum. Hetta átti ikki at komið sum nakar størri hvøkkur fyri teir føroyingar sum hava fylgt við, hava sæð øll dømini um hvønn veg tað bar. Skipanin er nú so misbrúkt og útholað at hon hevur mist tað besta av sínum upprunaligu týdningi og sína ætlaðu megi.

Fyri Føroyar er tað sum hent er onki minni enn ein vanærulig skomm og bøtist bert aftur um løgtingið ger sína skyldu.

**Dómurin frá umheiminum eri ikki minni óhugnaligur**
"Hesi fjølmiðladømini geva eina mynd av Klondyke ella svartasta Afrika. Ikki einum nýmótans demokrati".

Sannast má, at ongin skipan er betur enn tey sum umsita hana gera hana til.

Tað er uppá hægstu tíð at Sambandsflokkurin kemur framat og fær rætta kósina aftur á beint.

# Tíverri eingin fusari

**Tað var tíverri eingin fusari, tá víst varð á vánaligu støðuna í heimarøktini í sjónvarpssendingini sunnukvøldið 4. januar**

**Edvard Joensen**
*valevni Javnaðarfloksin í Vágum*



Tað hevði betri verið, at tað var so, at heimarøktin var ein sólskinssøga, sum Sámal Petur í Grund so »skinhelligur« leggur upp til í valgrein í Dimmalætting 9. januar, har hann við støði í viðurskiftunum á eldraøkinum biður fólk um ikki at taka málið upp!???

Men nøkur sólskinssøga er hetta tíverri ikki. Og har eigur Sámal Petur í Grund, sum stuðul hjá fráfarnu samgongu, eisini sín part av skuldini. Tað hevur regluliga verið víst á støðuna millum valini, men av einihvørji grund hava starvsfólk og onnur ábyrgdarhavandi ikki verið til at fingið orð av.

Nú, eftir at val er útskrivað, er knappliga onkur, sum tekur blaðið frá munninum. Millum annað okkurt valevni á sama lista, sum Sámal Petur í Grund er uppstillaður á. (Sosialurin 9. januar og ivaleyst Dimmalætting seinni.) Kom ikki við slíkum halgilótum Sámal Petur. Kalla eina blæu fyri eina blæu. Tá tú nevnir eitt evni, eru menniskju knýtt at tí.

Tit, sum aktivt hava verið í politikki, eiga at hava ringa samvitsku av hesum málinum. Tað er skilligt. Tí sum pensionisturin í innslagnum hetta kvøldið segði: »Teir eru blíðir við okkum upp undir val. Men fyrsta teir eru valdir, so skíta teir á okkum«.

Javnaðarflokkurin torir at nevna hetta málið. Hann torir at taka upp á seg at rætta hetta uppaftur. Vit hava víst á, hvussu tað kann gerast.

Veljarin fer 20. januar at hjálpa okkum at gera tað við at velja Javnaðarflokkin.

# Er "studningur" bert eitt ljótt orð?

**Karl Olgar Joensen**
*valevni Sambandsfloksins í Norðoyggjum*



Tað hevur verið sigur í Føroyum, at rætta eina hjálpandi hond har ið á stendur. Hetta hevur eisini mangan verið gjørt í politikki, t.d. tá ið fiskivinnan ella partar av fiskivinnuni hava verið illa fyri. Eg hugsi her um studning, stuðulslán o.s.fr. Ymiskt hevur verið, hvussu stuðulin hevur roynst. Stundum hevur hann roynst væl, aðrar tíðir minni væl.

Tað løgna er nú hent, at orðið "stuðul ella studningur" er gjørt til eitt ljótt orð av sitandi samgongu. Tað er ikki lukkuligt at taka hetta orðið uppá tungu. Men soleiðis hevur ikki altíð verið, leita vit nøkur ár aftur í tíðina, var studningur eitt sera avhildið orð. Sagt var, at tað skuldi bara mangla, at fiskivinnan ikki fekk nakað av peningi afturborið. Tingmenn tosaður nógv um afturbering til fiskivinnuna. Sannast má, at nógv kann broytast við tíðini.

**Tað stóra undrið.**
Vit hava hoyrt, serliga Tjóðveldisflokkin, tosa um tað stóra undrið, sum hendi, tá ið studningurin varð tikin av, og at hetta var orsøkin til fiskivinnan fór at blóma sum ongantíð áður.

Hetta er ikki rætt, tí orsøkin var fyrst og fremst, at fiskiskapurin gjørdist góður, fiskaprísirnir met høgir, rentan lág og oljuprísurin nøkunlunda støðigur. Hetta eru viðurskifti, sum vit í Føroyum als onga ávirkan hava á men eru noydd at laga okkara landshúsarhald eftir.

Tann góði byrðurin, ið verið hevur seinastu árini, er ikki so góður longur. Rækjuprísurin er farin í botn, og øll rækjuvinna er við at fara av knóranum - legg merki til - hóast henda vinnan ongan studning fær. Men tey, sum sita í samgonga í dag, kunnu einki gera, tí ein má ikki siga ljót orð sum stuðul og studning.

Sjálvsagt er tað best fyri allar partar, at fiskivinnan klárar seg uttan stuðul, men Sambandsflokkurin er sinnaður at rætta eina hjálpandi hond tá ið á stendur. Vit vilja geva tíðaravmarkaðan stuðul til - í hesum førinum rækjuvinnuna - ístaðin fyri, at offra hesi stásiligu førini í okkara fiskiflota og tveita 100-talls arbeiðspláss burtur. Sambandsflokkurin legði tí uppskot fram um FAS-skipan til rækjuflotan at galda í eitt 2-ára tíðarskeið, men tíverri fall uppskotið. Einki bjargingaruppskot kom frá samgonguni og sigur hetta nakað um lítla áhugan fyri fiskivinnuni hjá meirilutanum á løgtingi.

**Grundarlagið ridlar**
Fyri mongum árum síðan segði ein tingmaður, at okkara samfelag hevur trý bein at standa á: Ríkisstuðul, heimafiskiskapur og fjarfiskiskapur. Síðan tá hava vit fingið eitt bein afturat, og er tað alivinnan.

Ein stórur trupuleiki í dag er, at hesi beinini, sum skulu bera okkum uppi, nú eru viknaði. 360 mill. kr. eru høgdar av árligu ríkisveitingini, og rækjuvinnan og alivinnan eru í kreppu. Hetta er ein álvarsom støða, tá hugsað verður um, hvussu dýrt okkara samfelag er vorðið at reka. Um henda skeiva gongdin ikki verður steðgað, so er vandi fyri, at alt samfelagið verður rakt.

Sambandsflokkurin hevur sett sær fyri at gera nakað við hesi viðurskifti. Fáa vit undirtøku frá veljarunum, taka vit róður í hond eftir valið. Flokkurin fer at virka fyri tryggleika, framburði og vælferð fyri allar føroyingar, og vit biðja um tygara hjálp til tað.